# Bíblian í klæðsekkinum – tr

**Á allahalgannadegi, týsdagin, 1. november, vóru minningarhald við minnisvarðarnar kring um landið. Á Hotel Tórshavn í Havn var, sum vanligt er, eisini skipað fyri minningarhaldi. Í ár vóru eini 120 fólk samankomin til haldið, har løgmaður, Jóannes Ejdesgaard og Heri Joensen, prestur, hildu minningarrøðu yvir teir sjólátnu**

MINNINGARDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Røðurnar á haldinum á Hotel Tórshavn vóru merktar av, at tað í ár eru liðin seksti ár, síðan seinni heimsbardagi var av. Fleiri enn 200 føroyskir sjómenn doyðu av krígsávum undir seinna heimsbardaga, og til minningarhaldið hesaferð vóru fleiri av teimum gomlu avvarðandi, sum mistu onkran av sínum undir krígnum – ella vóru avvarðandi av onkrum teirra, sum fekk váta grøv.

Eftir sjálvt haldið á Hotel Tórshavn fóru fólk sum síður er niðan í Viðarlundina, har løgmaður legði krans við minnisvarðan. Løtan við minnisvarðan endaði við, at prestur bað eina bøn yvir teir, sum fórust og tey, ið eftir sótu.

### Á hálvari stong

Tað var Jeffri Johannesen, sum aftur í ár tók sær av haldinum á Hotel Tórshavn.

Løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, helt eina góða minningarrøðu hendan dagin.

Hann vísti á, at ein slíkan dag verður litið aftur um bak – til tíðina, korini og váðan undir krígnum, tá missurin var av teimum størstu.

- Siðurin at minnast teir sjólátnu hevur samband við flaggsøgu okkara, og flaggsøgan er nær knýtt at krígnum og sluppunum. Tað var júst undir krígnum, tá málið um føroyskt flagg var til viðgerðar, at løgtingið samtykti at sýna "Føroya sjólátnu synum landsins takklæti, heiður og djúpastu virðing við ein serligan dag í árinum at draga føroyska flaggið á hálva stong."

Løgmaður segði, at í fyrstuni var talan um nýggjársdag, nýggjársaftan og miðføstusunnudag, men í 1949 samtykti tingið, at allahalgannadagur skuldi vera minningardagur teirra sjólátnu.

- Eins og á ólavsøku taka landsmyndugleikar og kirkjumyndugleikar lógvatak á allahalgannadegi. Dagurin er ein av hesum tignardøgum, tá vit sum tjóð hava felags stev. Vit eru samd um at steðga á, og vit eru samd um at fylgjast og at fylkjast. Í virðing fyri lívsgrundarlagi okkara er hesin forni, altjóða minningardagur, halgaður sjómonnum.

### Havið er vegurin

Jóannes Ejdesgaard segði, at fyribrigdið alheimsgerð er ikki nýtt.

- Alheimsgerðin hjá føroyingum tók dik á seg við flagginum og sluppunum, tá mørk vórðu flutt longur út á tað víða, stóra og ótemjandi havið, sum vit troyttu á egnum kjøli undir álvarsligum og lívshóttandi umstøðum. Havið hevur frá upphavi verið heimsins og okkara alheimsgerð. Heilt frá tí ókenda frumhavinum til kaosímyndina av tí villa, óvissa og ótemjandi. Tað gevur, tekur – og krevur. Men havið er eisini vegurin hjá forvitninum, menningini og nýskapanini og sambindingarvegurin við onnur lond, helt løgmaður fyri.

Og hann helt fram:

- Tað er við at vága, at vit liva. Og liva her heima, tað skulu vit - tí vága vit.

Hann vísti á orðatakið, at "tann, ið einki váðar, hann einki vinnur".

- Tað er við at vága út á hav, at vit hava livað og yvirlivað. Tað er við at seta lívið í váða, at okkara sjómenn enn sum áður - og ikki minst undir krígnum - skaptu og skapa møguleikar at liva hjá konu og børnum heima og hjá okkum sum tjóð.

### Ráða ikki øllum

Løgmaður vísti á, at føroyskir sjómenn veruliga settu lívið í váða undir seinna heimsbardaga, tá ið





*- Støðugt vera vit mint á, at vit ráða ikki øllum. Lívskorini eru betrað sum heild, men enn kosta tey tí einstaka. Tað er á markamótinum, har vit ikki hava ræði, at felags lagna okkara tekur við, segði Jóannes Ejdesgaard*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sjófólk vita, hvar hj

**- Sjóvinnan er okkara høvuðsvinna. Alt annað veldst um, hvat fæst úr sjónum. Tí eiga vit at biðja fyri teimum, sum hava sín gerandisdag á havinum. Vignast væl hjá teimum, verður eisini framgongd í landinum, segði Heri Joensen, prestur við minningarhaldið**

MINNINGARHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heri Joensen, prestur, vísti í sínari minningarrøðu á, at á allahalgannadegi er hugurin knýttur at høvuðsvinnu okkara, sjónum.

- Havið upptekur hug okkara, og hetta er ikki av tilvild, ti allar tær gomlu bygdirnar eru reistar við havsins strond. Hetta er náttúrligt hjá eini fiskivinnutjóð. Soleiðis var eisini lutvíst í Jødalandi og við Genesaretvatn, har illveður kundi bresta á. Menniskjan stríddist móti náttúrukreftunum, har hin lítli báturin fjaldist í aldunum. Teir royndu fiskimenninir kendu sjógvin og styrki hansara, eins og okkara fiskimenn gera. Lívsroynslan hevur lært teir tað. Dugdi tú líkindini, var tú eisini ein skilamaður.

Heri segði, at tað, sum hevði týdning tá – og tað, sum hevur týdning í dag, er, at teir, sum søktu sjógvin, høvdu hin almáttuga innanborða.

- Hann var og er enn hin einasta vónin – vónin um, at lívið heldur fram. Tí kallaðu teir eisini á hann: "Harrin bjarga tú okkum – vit ganga burtur".

Og prestur helt fram:

- Lærusveinar Jesus vóru í vanda staddir á sjónum; tí róptu teir á meistara sín, "Harri bjarga okkum!". Tá ið stormurin er riðin av, siga hesir menn í undran: "Hvør er hesin maður, at bæði vindar og sjógvur eru honum lýðin?"

Heri vísti á, at nútímans tøknin er ongantíð so góð, at hon kann byrgja uppfyri vanlukkuni umborð ella aðrastaðni. Tí ásannast orðatakið ferð eftir ferð, at "vandi er í hvørjari vælferð.

- Eisini í ár kravdi lívsnervin ella høvuðsvinna okkara sítt offur – og við-